*Okkara kundi er ein handils-og framleiðslu fyritøka á Skálafjørðinum, við einum sera breiðum vøruúrvali. Fyritøkan er ein støðug fyritøka við drúgvum royndum innan sitt øki. 9 fólk starvast dagliga í fyritøkuni. Vegna nógv økt virksemi í handlinum, sóknast fyritøkan nú eftir*

## Handilsfólki

Persónurin, sum vit leita eftir, skal kunna átaka sær fylgjandi:

***Uppgávur:***
- Røkja dagligu uppgávurnar í handlinum
- Skriva og senda fakturar út
- Avgreiða kundar yvir disk
- Taka telefonina
- Dekorera vindeygu og handilin annars

***Førleikakrøv:***
Ongi krøv eru til ávísa útbúgving, men vit vænta av tær:

- at tær dámar væl at selja
- at tú ert fyrikomandi og dugir væl at fáast við fólk
- at tú ert nærlagdur, arbeiðssamur og røkin
- at tú ert búgvin og sjálvstøðugur
- at tú hevur góð samstarvsevni
- at tú dugir væl at tosa og skriva føroyskt og danskt á handilsstøði, kunnleiki til enskt mál er eisini ein fyrimunur

***Setan og løn:***
Ynskiligt er at viðkomandi kann byrja umleið 10. august, men vit kunnu tó bíða nakað eftir tí rætta fólkinum. Talan er um eitt starv í fullari tíð, sum er tímalønt sambært sáttmála ímillum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Arbeiðarafelag.

***Umsóknir:***
Er hetta eitt starv fyri teg, ert tú vælkomin til at senda eina umsókn til: Virkisráðgeving Spf, Boks 26, 600 Saltangará. Umsóknarfreist er: Mikudagin 2. august 2000.

Um tú ynskir at vita meir um starvið, kanst tú seta teg í samband við Virkisráðgeving Sp/f, tlf. 44 95 91 og tosa við Sigvør Lakså ella Símun Hammer. Umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

**Virkisráðgeving Spf**
Leiðsla - Búskapur - Marknaðarføring - Rekruttering - Góðskuskipanir
Heimasíða: http://www.konsult.fo

## Kunngerð um framløgu av byggisamtykt

Sambært gr. 6 í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir við seinni broyting, verður við hesum gjørt kunnugt, at uppskot til broytingar av byggisamtyktini fyri SUNDA KOMMUNU verður lagt fram til alment eftirlit á kommunuskrivstovuni frá 20. juli 2000 til 10. august 2000, báðir dagar íroknaðir í vanligari skrivstovutíð.

Møgulig mótmæli móti uppskotinum og broytingaruppskot til hetta, sum skulu vera skrivlig, mugu vera bygdaráðnum í hendi í seinasta lagi 20. okt. 2000.

*Norðskála tann 18. juli 2000*
**Sunda kommuna**
460 Norðskála

**Til sølu 1 stk. brúktur Copma C 1830 lastvogns-krani við spæli**



**Sp/f Norð Trukk**
Postrúm 1315 • 110 Tórshavn • Tel. 315136 • Fax 310931

## Frá 1000 ára haldinum

Sunnudagin 23. juli kl. 17.00 heldur Hans A. Samuelsen fyrilestur um halgidagasiðir í Bygdarhúsinum á Húsum.

Niels Midjord, Petur J. Eliasen og Hans J. Hansen úr Fuglafirði syngja sjósálmar, soleiðis sum Marius Vilhelmsen á Syðradali K. sang teir.

**FØROYAR KRISTNAR Í 1000 ÁR**
Postboks 1121 · tlf. +298 321132 · fax +298 321761 · FO-110 Tórshavn

## Heimahjálparafelag Føroya

Skrivstovan er stongd vegna summarfrí frá mánadegi 31. juli. Opið verður aftur mánadagin tann 21. august.

**Nevndin**

## H71

Aðalfundur felagsins verður í Hoyvíkar skúla tann 20.07.00 kl. 20.00.

1. Val av nevnd
2. Góðkenning av roknskapi
3. Viðtøkubroytingar
4. Ymiskt.

## Sethús

**Grønlandsvegur 14, Tórshavn, til sølu**



Húsini eru í trimum hæddum, hvør hæddin 90 m². Á loftinum er stova, 5 kømur, lítil køkur og gongd. Í miðhæddini er stór stova, spísistova, køkur við spískamari, eitt kamar, baðirúm og gongd. Kjallarin óskildraður.

Grundøki 572 m². Gott útsýni yvir Nólsoyarfjørð. Byggiár fyrst í 50-árunum.

Húsini verða seld, um hóskandi boð fæst. Áhugað vendið sær til

**Óli Mikkelsen,** tlf. 314080
**Eyðleyg Hansen,** tlf. 313423

*Lýsið í* **sosialinum**

**PLAST VINDEYGU og HURÐAR á GOYMSLU**




ALUMINIUM & PLASTVIRKIÐ P/F
www.plastvirki.fo

**Umsiting:**
Tel 31 87 96
Fax 31 87 46
Í Svanga 23
Postboks 199
FO-110 Tórshavn
e-mail: plastvirki@plastvirki.fo

**Verkstaður:**
Norðagøta



# Hendur & Hugflog 2000

Søluframsýning fyri listhandverk og heimavirking



## Innihald:

Ein básur er ikki bara ein básur

Ung men gomul í fakinum

Hornini hava tikið yvir

Forkunnugir gestaframsýnarar úr grannalondunum

Summarvindur - ein lítil søga

Vørumenning og marknaðartørvur - tvær síður av somu sak

Básyvirlit og framsýningarskrá

# Vælkomin á framsýning

***21. til 23. juli í høllini á Hálsi***